Fylgiskjal 51

Sandavágur 23. februar 2024

Viðmerkingar til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Vit vara av hagapartinum Gimbrahagi í Sandavági, 255 áseyðir. Hagaparturin eigur økið har føroyingar og útlendingar ganga frítt og ókeypis út til útsýnið av Trøllkonufingri og stórslignum náttúruni har um leiðir.

Í hagapartinum er fjallgonga fýra ferðir um árið. Várgongur, í apríl at geva heilivág og áseyðaroyting í juli. Heystfjøll vera gingin síðst í september/fyrst í oktober, fyrst veðurlambsskurður og til seinast klipping, tá nýtt verður sett við og gamalt avtikið.

Hagaparturin er seldur sum haruhagi frá 2. november til 31. desember á hvørjum árið. Tá "eiga" harumenninir hagan og vit hava í roynd og veru einki at hava skula sagt, meira enn at vit eiga matrikulin. Og onnur óviðkomandi eiga at halda seg burtur, vegna vandan fyri váðaskotum, tað í á donskum kallast vådeskud. Haruskjóting er IKKI sunnudag.

Lembing fer fram síðst í apríl og inn í mai mánað.

Verðagjólingar vera sleptir út fyrst í desember og tiknir inn aftur um leið fyrst í februar árið eftir.

Roynt hevur verið at skipa fyri túrum við ferðaleiðara í hagapartinum. Men í tí eina førinum, har fyriskipa og lýst var, var eingin sum teknaði seg. Ístaðin var fari inn á ávísu heimasíðuna, har ein og hvør fekk kunning um okkara gongutúr, og so var fari avstað í sjálvdrátti. Men í paragraf 5 er tikið hædd fyri hesum.

Aðrir lættari túrar hava verið seldir, har vit hava ferðaleiðaran.

Fyritøkur hava biði um túr við ferðaleiðara frá okkum.

Tað er í høvuðsheitum okkara brúk av hagapartinum.

Paragraf 1 – Endamál

Burðardygd, tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur, vinnumøguleikar, verja náttúru, verja tilfeingi, verja siðvenju, styrkja staðbundin, styrkja mentan, styrkja mentanararv, styrkja samstarv, kunning um gongd í haga og skipan av ferðavinnu.

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 1:

Skapa inntøkur, skapa virksemi, skapa trivnað kring landi.

Paragraf 2 – Allýsingar

Bygdin / Heimafólkið

Handilslig ferðavinna

Innangarðs

Uttangarðs

Fjøran (Strond) Lunnindir

Eigari

Brúkari

Ósemja, landstýrismaðurin

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 2:

Onga viðmerking

Paragraf 3 – Almannarættur

Einum og hvørjum er frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini (fjøran/lunnindir)

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 3:

Almannarættur hjá føroyingum

Byrja verður í paragraf 3, at geva øllum loyvi at ferðast frítt allaðstaðni uttangarðs. Bæði føroyingar og útlendingar/turistar.

At seta í gildi ein almannarætt til føroyingar til at ganga í fjøllunum og at geva **turistum** "fríbillet" til føroysku nátturuna, er hvørt sítt og eigur ikki at vera samantvinna.

Tað hevur allar tíðir verið frítt at fara hjá føroyingum, at ganga í haganum og í flestu førum verður fari hóliga fram og eisini verður biði um loyvi, sum vit síggja sum virðing og kursteisi frá gongufólkum, tey fáa altíð eitt ja, her frá. Men nú er ágangurin blivin so stórur, at valt er at leggja hetta í eina lóg. Sum

gevur føroyskum skattaborgarum frítt at fara. Og tað kunnu vit eisini taka undir við. Men atlit mugu takast til tey viðurskifti, sum eru nevnd omanfyri, hjá øðrum jarðarfólkum kunnu vera onnur viðurskifti, at taka altit til.

Og tá ein nú fer at gera ein føroyskan almannarætt, so má tað eisini skerast út í papp, at tey í vara av jørðini ella eiga jørðina, fáa arbeiðsfrið, til tað omanfyri nevnda virksemi. Tað sum føroyingar hava gjørt í fleiri árahundrað. Tað sum í innganginum kallast mentan og siðvenja.

Turistar frítt at ferðast uttangarðs?

Tað at geva øllum turistum ein "blanko check" bara tey hava goldið eina alt ov lítla samsýning til landi, er burtur úr vón viti.

Eftir okkara meting eiga allir at turistar at gjalda eitt gjald á t.d. 150 krónur, samsvarandi 20 evrum, sum kann fara í ein grunn til ábøtur vm. Hetta gjald verður praktisera aðrastaðir, har massaturisma er, men gjaldið gevur eingi rættindi til nakað sum helst og ein skal gjalda við komu til landi. Hetta er bara ein ferðafólkaskattur ein skal gjalda. Tí kann gjaldið standa, men tað skal eingi rættindir hava við sær. Og gjøld fyri túrar, sum longu eru og koma, skulu vera tey somu. Hetta vísandi til útboð og eftirspurning og til paragraf 1.

Tað eigur at vera frítt fyri føroyingar, føroyskar skattaborgarar og familjur teirra at feraðst frítt.

Men turistar skulu IKKI ganga frítt, tí tað tolir hvørki mentanin, siðvenjan ella náttúran hjá okkum. Alt uttangarðs, sum hevur samband við turistar skal og má skipast.

Men gott at fáa hetta uppá pláss, við eini standard avtalu gjørd frammanundan.

Paragraf 4 – Atburður

Stk 1 - Ferðast uttangarðs. Fyrilit, fara væl um, ikki til skaða ella ampa hjá eigara, festara (brúkara), fenaði, náttúru, mentanararvi.

Stk 2 – Brúk av báti

Stk 3 – Bannað at taka gróður, egg, steinar og grót.

Stk 4 – Ikki loyvt at taka hund við í hagan (einans til landbúnaðarvirksemi)

Stk 5 – Eigari rætt at vísa fólki burtur, sum eru fyrilitarleys, gera skaða ella eru til ampa.

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 4:

Onga viðmerking

Paragraf 5 – Handilslig ferðavinna/Áseting/Standardavtala

Stk 1 – Handilslig ferðavinna í samráð við eigara/festara. Er í sær sjálvum gott og tað hava vit sakna ein leist fyri. Tí tað finnast dømi um at ferðavinnufeløg útlendsk/føroysk gera sær dælt av, at vinna penning inni á annan mans ogn.

Stk 2 – Krav um at standardavtala skal geraðst er gott. Tað tryggjar okkum sum eigara, at vit fáa tað, ið vit eiga at fáa burtur úr ognini peningaliga.

Stk 3 – Landstýrismaðrin skal gera standardavtalur, hvat liggur í tí?

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 5:

Tað at handilslig ferðavinna skal gera túrar í samráð við tann í varar av jarðabrúkinum er gott í sær sjálvum. Tað merkir at bólka/ferðaleiðaratúrar, skal avtala vera um frammanundan. Men við at krevja, at turistar fleiri enn 4, skulu hava føroyskan ferðaleiðara, ger hetta samtundis tað, at føroysk handilslig ferðavinna fær meira at gera og harvið fleiri inntøkur. Turistar, færri enn 4, skulu vera vístir til handilsligu ferðavinnuna (føroyskar aktørar), har tey kunnu fáa tað kunning, ið krevst fyri at fara uttangarðs, hvørjir aktivitetir eru osf., hetta ímóti einum minni gjaldið til handilsligu ferðavinnuna (føroyskar aktørar), sum samstundis tekur inn gjaldið, sum ávísi hagaparturin eigur í sín part fyri einstakar turistar uttangarðs.

Paragraf 6 – Ferðavinnuætlan

Stk 1 - Ferðavinnuætlan innanfyri kommunumark, samdur.

Stk 2 – Ferðavinnuætlan skal minimum fevna um. Er í lagi í sær sjálvum, men landstýrismaðurin í vinnumálum fær ov víðar heimildir.

Stk 3 – Ferðavinnuætlan og góðkenning. Er í lagi í sær sjálvum, men landstýrismaðurin í vinnumálum fær ov víðar heimildir. Tað má finnast annar leistur fyri hvussu góðkenning skal fara fram og tað skal tilskilast í lógini, sum nakað hondfast. Tað má ongantíð vera upp til ein hvønn landstýrismann í málinum at avgera.

Stk 4 – Ferðleiðarar og landstýrismaður. Tað má vera upp til hagapartin saman við lokala myndugleikanum, at avgera hvussu hetta skal vera.

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 6:

Tað er júst hetta vit hava brúk fyri at hoyra, sum tann hagaparturin, sum eigur økið har fólk fara út at hyggja eftir Trøllkonufingur. Vit hava longu frammanundan hesum, ein góðan dialog við Vága kommunu, um økið og VK hevur goldið fyri viðlíkahald av økinum. Eisini hevur VK eftir áheitan frá okkum skipa fyri, at ferðsluruðuleikin á smala traðarvegnum var loystur.

Paragraf 7 – Nevnd hjá heimafólki

??

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 7:

Paragraf 8 – Farleiðir

Í hagapartinum vit vara av, hava vit í samráð við Vága kommunu, gjørt umvælingar og økt um trygdina út at pallinum til Trøllkonufingur. So í roynd og veru verður hetta longu praktisera, men tað gerð tað ikki verri at tað er komi í lógina.

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 8:

Hendan paragrafin leggur stórar byrðar á føroysku kommunurnar.

Paragraf 9 – Skilhaldsreglur

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 9:

Reglur eru til at bróta og vit síggja tað dagliga, at skelting munar ikki nóg væl. Tey eiga at vera harðar treytir fyri at bróta skilhaldsreglur og enntá ferðslureglar hjá útlendingum. Strangari reglur, eiga at vera lagdar á útlendskar bilar og føroyskar leigubilar, tá reglur vera brotnar.

Tað liggur til okkum menniskju, í øllum førum nøkru, at royna at lumpa okkum undan ymiskum kostnaðum. Vit eiga at gera eitt regleverk/lógarverk, har tað verður álagt útlendingum, ið koma til Føroya við bili, fáa eina kunning. Longu umborð á Norrønu. Í sambandi við leigubilar, skulu hesar fyritøkur, áleggjast kunning um reglur og sekt. Tildømis eiga allir leigubilar at vera merktir við einum merki á báðum forhurðum, at talan er um leigubil. Positivt dømi eru bilarnir hjá Reyni Service, ið allir eru merktir við klistrimerki "Leigubilur".

Paragraf 10 – Yvirtøka av jarðarluti

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 10:

Onga viðmerking.

Paragraf 11 – Trygd

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 11:

Strangar reglur eiga vera fyri gongd í haga, fyri útlendingar. Tað skal til eina og hvørja tíð vera eitt krav, at føroyskur ferðaleiðari er við. Hagin kann eventuelt býtast upp í niðara og ovara part. Har ovari partur við hæddum, bjørgum og skorum, hevur strangari reglur.

Paragraf 12 – Gjaldsportur, atgongd og stongsil

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 12:

Vit hava verið vitni til at ongin skelting, gav tað reina wild west, viðvíkjandi turistum. Men eftir at skeltir vóru sett upp av Vága kommunu og Visit Vágar, í samráð við hagapartin, er ein markant broyting hend tann betra vegin.

Men tað vilja altíð vera nøkur sum ikki yvirhalda reglur. Vit nevndu merking av leigubilum og kunning frá leigubilafyritøkum til turistar, sum eina eyka kunning.

Paragraf 13 – Náttúrugjald fyri turistar

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 13:

Sum áður nevnt, eitt gjald uppá 150 kr / 20 evrur er passandi gjald. Men eingir fyri munir og rættur til gongd í haga skal fylgja við hesum.

Paragraf 14 – Inntøka náttúrugjald og býti av hesum

Viðmerkingar til viðmerkingar til paragraf 14:

Tað eigur at vera tilskila hvørjir hagapartar eiga at fáa úr grunninum.

Onkustaðni er nevnt at skráseting av gongufólki í hvørjum einstøku hagaparti, kann gerðast við fartelefonini hjá fólki. Og alt eftir tí skal býti vera. Býti eigur at

vera helvt um helvt, kommuna og hagapartur. Men um 25 prosent skulu til heimafólk, eru tey lokalu sjálvbodnu bjargingarfeløgini, eitt gott boð uppá samsýning.

Paragraf 15 – Boð

Eingin viðmerking

Paragraf 16 – Revsing

Eingin viðmerking

Paragraf 17 – Gildiskoma

Eingin viðmerking

Paragraf 18 – Broyting

Eingin viðmerking

Niðurstøðan hjá hagastýrinum

Vit vísa til viðmerkingarnar oman fyri, men eru annars samdir við tí mesta í yvirlýsingini hjá Óðalsfelagnum og Bóndafelagnum.

1. Turistar mugu undir ongum umstøðum ganga frítt uttangarðs. Skipaði viðurskiftir er eitt krav.

2. Nýggja lógin leggar stórar byrðar á føroysku kommunurnar.

3. Lat staðbundnu fólkini fáa frið at skipa ferðvinnu. Tað verður til eina og hvørja tíð, útboð og eftirspurningur, ið fólki flyta.

4. Landstýrismaðurin í varar av, fær alt ov stórar heimildir. So at siga alt má leggjast í lógina, fyri at umganga einaveldi. Sum tað stendur nú, er alt lógaruppskoti óbrúkiligt, tí ein persónur hevur vetorætt yvir annan mans ogn.

5. Í lógaruppskotinum eru fleiri góðir smálutir, ið kunnu brúkast til okkurt hjá einum jarðareigara. Men punktini, at turistar ganga frítt og heimildirnar hjá landstýrismanninum, punktera uppskoti.

6. Ognarrætturin hjá ognarfólkum verður brotin, ikki virdur.

7. Ognarfólk eiga rætt til at takka nei til ferðavinnu. Leiðsla/Hagastýri og Hagastevna eiga hendan rættin í dag.

8. Við hesum leistinum vera Føroyar ein frítíðarpark hjá turistum, avleiðingarnar vera óyvirskuðiligar, helst ikki til at rætta upp aftur. Mótsigandi føgru orðunum í paragraf 1.

Hagastýri fyri Gimbrahaga í Sandavági

Jan Erik Simonsen

Rani Slættanes

Gerhard H. Hansen

Páll N. Slættanes

Tórstein á Steig